## CIA fekk loyniligt avrit

Í 1948 gav danska fregnartænastan amerikonsku fregnartænastuni CIA eitt avrit av sínari skjalagoymslu við upplýsingum um danskar ríkisborgarar og teirra politisku viðurskifti. Tað skrivaði Jyllands-Posturin í gjár, og upplýsingarnar hevði blaðið úr einari frágreiðing, sum tann sokallaða PET-kanningarnevndin legði fram tann 24. juni. At CIA fekk eitt avrit komst, at danir vildu tryggja sær eitt avrit, um tað skuldi hent, at danska fregnartænastan bleiv noydd at koyra savnið burtur, um russar skuldu hersett Danmark undir Kalda Krígnum.



## Kongshúsið fyrimynd

Meirilutin av teimum politisku flokkunum í Danmark halda, at kongshúsið eigur at virka sum fyrimynd, nú Danmark er vertur fyri altjóða veðurlagsráðstevnuni hjá ST seinni í ár og skal royna at fáa eina altjóða semju um at tálma avleiðingunum av veðurlagsbroytingunum. Ejvind Vesselbo, sum er umhvørvisfrásøgumaður hjá Vinstra, sigur við donsk bløð, at tað hevði gagnað málinum, um kongshúsið gekk undan í hesum føri. Formaðurin í Fólkatingsins umhvørvisnevnd, SF-arin Steen Gade, sigur tað sama, og Sosialdemokratarnir eru av somu uppfatan, skriva bløðini.

*Lagt til rættis: Heri Simonsen og Rigmor Dam*



# Posta er bara byrjanin




**Nú Postverk Føroya hevur fingið navnabroyting til Posta, hava fólk havt úr at gera við at finna nýggj heiti til almennar stovnar. Vit nevna nøkur teirra her. Fleiri eru tikin av Facebook, og tit har heima kunnu heilt sikkurt leggja nógv fleiri afturat**

**IRF**
*Stinka, Lukta, Kukka, Tyrva*

**MBM**
*Mjólka*

**Taks**
*Kradda, Lokka*

**Almannastovan**
*Ridla, Nassa*

**Rúsan**
*Kulka, Tosta, Sutla, Bunkra*

**Fólkaskúlin**
*Skulka, Dumpa, Pisa*

**Frímerkjadeildin**
*Slikka*

**Svimjihøllin**
*Drukna*

**MRCC**
*Søkka*

**Fólkaheilsuráðið**
*Tuska*

**Veðurstøðin**
*Kanska*

**Alv**
*Virka*

**Løgreglan**
*Lurka, Ruska*

**Heilsufrøðiliga**

**Starvsstovan**
*Stongja*

**Líkbilurin**
*Doyggja*

**Fornminnissavnið**
*Dusta*

**Ráðið fyri ferðslutrygd**
*Krasja*

**Mentamálaráðið**
*Køva*

**Strandfaraskip Landsins**
*Spýggja*

**Løgtingsins Umboðsmaður**
*Lurta*

**Brúkaraumboðs-maðurin**
*Brúka*

**Fiskiveiðieftirlitið**
*Fanga*

**Fjarskiftiseftirlitið**
*Avlurta, Lúra, Sneyta*

**Samvit**
*Hvørva*

**Príseftirlitið**
*Dýra, Kosta*

**Vága Floghavn**
*Lenda, Glíða*

**SEV**
*Lýsa, Tendra*

**Skipaeftirlitið**
*Sigla*

**Almannamálaráðið**
*Spara, Pína, Níva*

**Løgtingið**
*Roksa, Sprella, Dolka, Vøsa*

**Matrikulstovan**
*Máta, Strika*

**Ríkisumboðið**
*Bestemma*

**Føroya Rættur**
*Døma*

**Ákæruvaldið**
*Bíða*

**Føroya Kærustovnur**
*Klaga, Grenja*

**Uttanríkisráðið**
*Ridla*

**Kringvarpið**
*Sløkkja*